# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Fyrsta føroyska fyritøka við svanamerki

**Føroyaprent hevur, sum fyrsta fyritøka í Føroyum, fingið svanamerkjagóðkenning. Hetta varð hátíðarhildið á Føroyaprent hósdagin 21. februar**

MÓTTØKA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður Kruse*

Sum fyrsta fyritøka í Føroyum hevur Føroyaprent fingið svanamerkjagóðkenning. Hetta varð hátíðarhildið á Føroyaprent hósdagin 21. februar við røðum og við at umboð frá Norðurlendsku Umhvørvismerkinginihandaði prógvið um, at Føroyaprent livir upp til umhvørviskrøvini í Svanamerkjaskipanini.

Tá stjórin í Føroyaprent, Jon Hestoy, hevði boðið øllum at vera vælkomin, segði Helena Dam á Neystabø, landstýriskvinna í umhvørvismálum, nøkur orð, síðan hevði Birgir Kruse, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni, eina hugleiðing, sum hann nevndi "Frá Svananesi til svanamerki", áðrenn Jesper Gruvmark frá Norðurlendsku Umhvørvismerkingini handaði prógvið upp á Svanamerkjagóðkenning til Jon Hestoy.

Svanamerkið er eitt prógv um, at fyritøkan livir upp til umhvørviskrøv, sum gera, at framleiðslan í allari fyritøkuni er ímillum tær minst umhvørvistyngjandi. Krøvini umfata í fyrsta umfari arbeiðsgongd, innkeyp, pappír og tey kemisku evnini, sum prentsmiðjan nýtir, skrivar Føroyaprent í tíðindaskrivi. Í prakstis merkir hetta, at fyritøkan hevur fingið loyvi at prenta norðurlendska umhvørvismerkið á teir prentlutir, sum prentsmiðjan framleiðir.

Jesper Gruvmark greiddi frá, at svanamerki er ein sjálvboðin norðurlendsk umhvørvismerking av vørum og fyritøkum við 3. parts eftirliti. Norðurlandaráðið setti skipanina á stovn í 1989. Fleiri túsund fyritøkur í Svøríki, Danmark, Norra, Finnlandi og Íslandi hava fingið svanamerkjagóðkenning. Nú er so fyrsta føroyska fyritøkan eisini komin við.




*Jesper Gruvmark frá Norðurlendsku Umhvørvismerkingini og Jon Hestoy, stjóri á Føroyaprent*



*Helena Dam á Neystabø, landstýriskvinna í umhvørvismálum, heldur røðu*



*Birgir Kruse, ritstjóri á Føroya Skúlabókagrunni, hugleiðir um svanar og svanamerki*




*Svanamerkið á bygninginum hjá Føroyaprent við Hoyvíksvegin*